VIÐMERKINGAR

Hvar koma størvini frá

Johan Dahl
løgtingsmaður

Hvar skulu størvini sum avloysað, sjómannin. flakakvinnuna - og mannin komað frá?

Kunnu hesi reisast innan rímiliga tíð , -ella er tað luftkastellir?

Við núverandi gongd eru útlitini fyri framman alt annað en bjørt í høvuðsvinnu okkara .

Um vit áhaldandi vilja hava eina fiskivinnu á landið, ella vit áhaldandi skulu latað meir enn helmingin av tilfeingið okkara fara óvirkað av landinum er tann stóri gordiski knúturin, sum loysn skal finnast á ongantíð og skjótt og kemur tað at krevja, at vit sum valdir eru av stýra hesum landið hava neyðuga dirvið til at takað ta skilabestu loysnina fyri samfelagið sum heild.

Eitt stendur púra greitt og tað er, at um ikki stig verða tikin til at betra um okkara kappingarevni so vit aftur eru førir fyri at framleiða til kappingarføra prísir og um vit ikki hava bestu og skjótastu marknaðaratgongd fyri okkara fesku vørur, so er bara ein spurningur um tíð til fiskivinnan á landið hevur fingið mønustingin.

Spurningurin er so eisini, um vit t.d. framhaldandi skulu halda fast við at **alt** skal framleiðast á landið av føroyska landgrunninum, ella skulu vit loyvað partvísari framleiðslu umborð á skipum ?

Spurningurin er m.a. .

Skal øll søla fyrstahonds søla verða yvir uppboðssølu í Føroyum og yvir føroyskan kaikant ??

Skal fiskurin einans kunna seljast av loyvis havara?

Skal landingarskylda verða í Føroyum ella skal 25% landingarmøguleiki framvegis verða uttanlands.?

Skulu skip og virkir gera avtalur sínámillum uttanum uppboðssøluna ?

Ella skal tað stórt sæ verða frítt slag ?

Skulu djúpvatnstrolararnir uppí fiskidagaskipanina?

Hvussu við stinglaksinum og búrfiskinum skulu hesir eisini landast í Føroyum ella?

Møguleikarnir eru nógvir, men tann loysnin sum ger øll nøgd finnst neyvan og tí verður tað ,sum tað sær út í løtuni ivaleyst neyðugt politiskt at skera ígjøgnum .

Marknaðar mekanismurnar eiga at stýra gongdini í so stóran mun sum til ber, men hinvegin ber ikki til hjá okkum fólkavaldu at sita og hyggja at, meðan føroysku framleiðsluvirkini á landið eru við at fara í skeljasorð og arbeiðsloysið veksur dag fyri dag, samstundis sum stórur partur av okkara tilfeingið - verður selt óvirkað uttanlands til okkara kappingarneytar at kappast við okkum við, - tað má verða tað sum kallast, at saga greinina av sum ein sjálvur situr á.

Tað er ikki nøkur áhaldandi haldgóð støða og eiga ávaringarljósini at lýsa hjá øllum involveraðum pørtum og bundið eigur at verða um heilan fingur áðrenn ov seint er.

Hitt alternativið :
Vit kunnu eisini gera so sum búskaparfrøðingar mælað til nevniliga :

- at lata fara tað í ikki kann klára seg, - ella
- at minka um útflutningsframleiðsluna (citat frá framløgu hjá H. Oskarsson á Christiansborg)

og so síggja hvat hendir komandi mánaðirnir við vinnuni?

Tann stóri spurningum er - er tað yvirhøvur ráðiligt at lurta eftir sokallaðu serfrøðingunum ??

Høvdu vit gjørt tað hesi seinastu 7-8 árini so var ongin fiskivinna í Føroyum ídag.

Fyri mær sær tað út sum teir eru sera góðir at hyggja í bakspegilin, men framskygni og vurderingar av framtíðarútlitum og evt. loysningsmodellum hava teir verið alt annað enn dugnaligir til at komað við.

Okkum nýtist ikki bakklókar — hvat segði eg frágreiðingar sum broytast og tillagast júst sum tað passar til, hvønn veg vindurin blæsur tá tær verða framlagdar.

Okkum tørvar **professionellar vísmenn** og **ráðgevarar** sum kunnu siga okkum t.d.:

- Hvat er best fyri okkum frameftir og ikki sum nú, hvat ikki var gott fyri okkum í gjár ella fyri einum mánað síðani
- Hvussu vit best tilrættisleggja okkara vinnur frameftir
- Hvussu vit kunnu fremja búskaparvøkstur
- Hvussu vit kunnu menna okkara samfelag framyvir
- Hvussu skapað vit nýggj arbeiðspláss og innan hvørjar vinnur er besti møguleikin at skapað nýtt í Føroyum havandi okkara fjarleika geografiskt í hugað
- Hvussu okkara politikkur best kemur samfelagnum sum heild tilgóðar.

Rætt og slætt hvussu vit skulu tilrættisleggja okkara samfelag frameftir.

Lat okkum síggja veruleikan í eyguni og royna at virka út frá honum og fáa tað besta burturúr honum, alt hitt "popptosið" fórir okkum onga leið .

Vit eru 48.000 sálir á hesum klettum, harav ca. 1.700 skrásettir sjómenn (harafturímóti tilsamanberingar sigst verða 2.300 pedagogar) — hesir 1.700 saman við útróðramonnunum eru grundarlagið undir okkara samfelag, saman við flakakvinnuni og manninum, - tað er okkara simpla plikt at skapað teimum bestu karmar at virkað undir.

Tórshavnar býráð
Samgongan 2000-2004

Rós og rís

Lars Jespersen

Nú, tað stundar til kommunuval, vil eg nýta høvið til at koma við míni meining. Eg skal ikki leggja meg út í, hvussu bý- og bygdarráðini í landinum hava roynst, men halda meg til mína kommunu, Tórshavnar kommunu.

Sum ofast, tá maður letur frætta frá sær í bløðunum, er tað orsaka av, at hann er ónøgdur, og soleiðis er eisini í hesum føri. Tó so, eg vil byrja við at rósa Tórshavnar býráði, ónøgdin verður síðani.

Býráðið setti sær fyri at nøkta tørvin á barnaansing í hesum valskeiði, og hevur tað eftir øllum dømum eydnast, rós fyri tað. Eisini eru nøkur tilboð givin teim gomlu, men tey nýggjastu tíðindi boða frá, at stórur tørvur er og verður á fleiri tilboðum, serliga í Suðurstreymoy. Tað kann so verða eitt mál hjá komandi býráði, so Tórshavnar kommuna fær røkt báðar endarnar.

Buktina hevur býráðið eisini um, men ein dekan og stór bukt eftir mínum tykki, tí um ein ferðast runt um Havnarleiðina, síggjast nýggj hús allastaðni. Undrist mangan, hvør skal inn í hesi hús, eisini, hvar heis hava havt innivist áður, men nýggju rundkoyringarnar eru kanska ein partur av svarinum.

Mangan hevur verið tosað um ferðslutrupulleik-arnar í Havn ávísar tíðir á degnum, serstakliga tá stóra mongdin av bilum á morgni koma til Havnar, til arbeiðis, í skúla ella bara til handils.

Tosað hevur leingi verið um, at rundkoyringar kunnu bøta um trupulleikarnar, gera ferðsluna smidligari, men nústaðni nú, valskeiðið er um at vera farið, komu rundkoyringarnir. Flest øll eru samd um, at hetta bøtir um, men vónandi læra fólk at brúka rundkoyringarnar, soleiðis at tey eisini finna út úr teimum aftur, og ikki blíva verandi í Havn, tí tá verður tørvur á upp aftur fleiri íbúðum, ansingarplássum til børn og gomul. – Men um ikki annað, so er talan um ein ferðslubata, rós fyri tað eisini!

Nú koma hjartasuffini frá mær, og hóast tey ikki órógva býráðið so nógv, tí tey neyvan telja tað stóra at rósa sær av, loyvi eg mær tó at koma fram við teimum.

Á húsaveggi í miðbýnum í Havn stendur við stórum grønum bókstavum, Plantið eitt træ, og vóru tað nógv fólk í Havn, sum tóku hesa áheitan til sín. Býráðið tók á seg, at lata borgarum ókeypis plantupakkar, og priða runnar og trø nú mangt umhvørvi í Havn og um Havnarleiðina. Í fjør fingu áhugað plantupakkarnar seint á heysti, tó so, at onkur planta yvirlivdi veturin. Men í ár bleiv plantupakkin burtur, og er tað harmiligt.

Í mong ár skipaði Tórshavnar kommuna fyri árligum ruddingardegi, og fekk hetta tiltak stóra undirtøku, eigarafeløgini tóku undir við tí, ungdómsfelagsskapir tóku lut í tiltakinum, men í ár bleiv einki stig tikið til ein ruddingardag. Borgarstjórin legði til grund, at tá brennistoðin á Sandvíkahjalla nú var so væl fyri at taka móti burturkasti, kundu borgararnir sjálvir koma niðan við tí. Endamálið við ruddingardegnum var ikki einans at rudda, men hevði avgjørt eitt sosialt og mentanarligt virði. Tað sosiala, at grannar komu saman og lærdu hvønn annan betri at kenna. Tað mentanarliga, at borgararnir komu at kenna ábyrgd av umhvørvinum.

Summi eigarafeløg hava av sínum eintingum skipað fyri ruddingardøgum, bæði á vári og um heysti, meðan einki er gjørt á kommunalu økjunum, og tað sæst aftur.

Friókir, áir og løkir hava verið ljót í summar, somuleiðis fram við vegunum, rúgvurnar av alskins óruddi rúgvar seg bara upp. Havi ikki havt smávegis skomm kommununa og egna vegna, at fremmandafólk í summar hava sæð ein skitnan bý.

Vónandi tekur komandi býráð táttin uppaftur.

Fyri stuttum hevur býráðið sett nakrar talvur upp, har einasta áskriftin higartil er Hoydalar, og er ætlanin ivaleyst at seta eitt kort upp á hesar talvur. Eitt kort, ið vísir ókunnufólkum, hvørjir møguleikar eru, at ferðast undir Svartafossi og í Hoydølum, men hetta kort er ikki komið upp enn, tí kanska verður tað heldur eitt ávarðingarskelti, ið mælir fólki frá, at fara hesar leiðir.

Orsøkin er tann einfalda, at gøturnar, ið ungfólk undir tiltakinum Ung í arbeiði løgdu stórt og gott arbeiði í, nú eru í so vánaligum standi, at vandi er at nýta tær. Havi í ár ikki sæð ung í arbeiði í Hoydølum ella har um leiðir. Havi tó skilt, at okkurt tilboð var til tey ungu í summarfrítíðini.

At enda loyvi eg mær at gera eina viðmerking um eitt mál, ið hvørki Tórshavnar býráð ella eg hava stórvegis ávirkan á, men sum tó harmar meg. Málið snýr seg um forðingarnar, ið settar eru upp á havnaløgunum til tess at byrgja upp fyri altjóða yvirgangi. Minnist aftur fasta siðin, at ganga út á molan aftan á dansin, ungdómsdagarnar, tá vitjað var umborð á russisku trolararnar at bidda sigarettir og at síggja film, at fáa sukurlátu og annað frá ensku trolaramonnunum.

Havnaløgini eru nú vorðin so stór, at vit høvdu ikki komið aftur í aftur, um vit í dag fóru gongutúr út á molan, men bara tað, at ein ikki hevur atgongd í egnum landi, harmar meg inniliga.

Um altjóða yvirgang á føroyskum bryggjukanti havi eg ikki so nógv at viðmerkja, men hvat kann ein barnakona úr Nigeria hótta okkum við, hvat hótta flóttar úr ymsum londum okkum við. Hørð avrokning við bryggjukantin, av landinum aftur, heldur enn at tikið tey til okkara, kannað, hví tey eru endaði her í einum landi, tey ikki hava hoyrt um, men lagann og neyðin hevur sent tey til: Tað hevði verið mansligari, at víst teim miskunn. Hugsið um tað!

Hetta var alt frá mær á hesum sinni og gott kommunuval í november.

VIÐMERKINGAR

Lokabrøgd landsstýrisins

Hergeir Nielsen

Landsstýrið hevur nú eisini lagt seg út í kommunuvalið í Suðuroynni.

Í Sosialinum verður í gjár, eina lítla viku undan valinum, boðað frá, at landsstýrið hevur slept ætlanini um at byggja miðnámsskúlan í Vági.

Raðfestingin av at byggja miðnámsskúla í Suðuroy sum tann fyrsta var gjørd longu fyri fimm árum síðan, og málið hevur staðið á løgtingsfiggjarlógini við smærri játtanum síðan 2001.

Fleiri avtalur eru virknar millum land og kommunu, arkitektakapping hevur verið, og 6 til 8 mió.kr. eru higartil brúktar til endamálið.

Býráðið hevur í neyvum samstarvi við mentamálaráðið lagt nógva orku í hetta mál og goldið væl av skattaborgarans peningi fyri eina almenna ætlan, sum Sosialurin nú boðar frá, at landsstýrið ætlar sær at loypa frá.

Landsstýrið trokar alla fyrisitingarliga siðvenju og alla almenna sømiligheit til viks, tá tað hástórt og í blómandi betrivitan sigur við kommunurnar í Suðuroynni, at tær nú í felag skulu byggja eitt ellis- og røktarheim á einum øki í Vági, sum Vács kommuna hevur lagt út til annað endamál enn ellis- og røktarheim.

Hevur nakar hoyrt so skapt?

Harafturat bíleggur Sosialurin sum fjølmiðlaráðgevi landsstýrisins eina mynd frá einari lýsingarfyritøku, sum so prýðir hetta loftkastelli hjá teimum ráðandi.

Ella er talan um úrslitið av einari fjaldari arkitektakapping?

Traðka býarskipanina undir føti

Í Vági er eins og í øðrum kommunum ein býarskipan galdandi. Økið vesturi við Vatnið er sambært býarskipanini lagt út til alment endamál, herundir ungdóms-, mentanar-, skúla- og ítróttarendamál, meðan lendið til ellis- og røktarheim liggur heilt úti í hinum endanum av býnum.

Hesa ætlan kommununar leggur landsstýrið vertin í. Valdið er stigið høgu harrunum í Havn til høvdið, og nærdemokrati er ein býur í Kina í teirra verð.

Man nøkur onnur kommuna í landinum fáa tilíka viðferð frá landsins stýri?

Friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til at byggja skúla samsvarandi byggisamtyktini fyri Vács kommunu og ikki til bygging av nøkrum øðrum enn einum skúla.

Arkitektakapping hevur verið um bygging av einum skúla á júst hesum staðnum, og vinnandi úrslitið var treytað av, at skúlin lá júst í hesum landslagnum og ikki nakra aðrastaðni.

Ein løgtingslóg er samtykt, sum heimilar júst hesi bygging á hesum stað.

Ein samtykt er gjørd av Vács kommunu um bygging av júst hesum skúlanum á júst hesum staðnum.

Ein long rað av øðrum formalitetum eru loknir fyri at fáa málið undir land.

Í góðum samstarvi millum land og kommunu er hetta trý ára gamla málið komið undir land, og klárt er at seta formarnar upp.

Men so kemur kinkur í.

Parlagið, Johan Dahl og Hendrik Old, sigur seg í fleiri felags greinum ætla nakað annað enn tað, sum land og kommuna hava samstarvað um í fleiri ár og hava fingið undir land.

Hetta er forrestin sama parið, sum legði fram lógaruppskot um Vács havn, _ ár eftir at lóg var samtykt um sama mál.

Málið um Vács havn noyddust teir sjálvandi at taka aftur 3 mánaðir seinni, og nú royna teir so á øðrum sinni at forpurra einum máli, sum aðrir hava bygt upp.

Divide et impera

"Deil og ráð" segði Louis 11. einaferð í miðøldini. Somu uppskriftina brúktu Philip av Makedonia, Machiavelli og aðrir meiri og minni góðir menn.

Setið bygdaløgini upp móti hvørjum øðrum. Røkkur hetta ikki, so setið bygdir og kommunur upp móti hvørji aðrari, vilt tú ráða.

Hetta er karráði leikurin, ið fer fram í løtuni, og suðringar skulu koma at nista og pípa, júst so sum helvtin av parlagnum hótti við undir viðgerðini av fíggjarlógini.

Spjaðing og sundurlyndi var uppskriftin fyri hundraðtals árum síðan, og hon tykist gott latín enn tann dag í dag.

Kommunurnar í Suðuroynni stóðu ikki saman um at byggja eina skúlastovu til eitt meginbókasavn, tí málið kom úr erva - segðist.

Hendan uppíleggingin kemur so sanniliga eisini úr erva, og als eingin trygd er fyri, at kommununar leita saman um at byggja felags ellis- og røktarheim í Vági júst nú. Tvørturímóti.

Harafturat verður sjálvandi lag á manni at fáa kommunurnar at bresta saman um hvørjumegin ánna ein skúlabygningur skal vera.

Harafturat er tað tað reina pipp at tosa um ein almanna- og heilsuskúla sum miðnámsskúla fyri 20-25 milliónir. Hesin skúli er ikki nær náminda skyldur við nakran miðnámsskúla.

Skjótt er spjaðingin so stór, at als einki verður bygt í Suðuroynni.

Og her eru vit so frammi við yvirskipaða málið í kollrenningini av miðnámsskúlanum í Vági. Einum skúla, sum kostar 6-8 mió.kr. higartil, og sum er klárur at bjóða út.

Endamálið er at sáða split og ósemjur í einum máli, sum er komið undir land, og so geva teimum lokalu skyldina fyri, at einki spurdist burturúr.

Er nakar veruligur áhugi fyri at byggja ellis- og røktarheim í Suðuroy nú, so eigur eitt tílíkt felags kommunu- og landsmál at takast upp á einum felags fundi, og haðani eiga felags avtalur at vera stungnar út í kortið.

Tílíkur fundur hevur ikki verið, tí eingin veruligur vilji er fyri at loysa eitt tílíkt mál her og nú.

Í staðin fyri at gera nakað veruligt til nyttu herjar nú landsstýrið við Sosialinum sum fjølmiðlaráðgeva á lokalsamfelagið í vikuni uppundir val.

Málið er at spjaða og ráða.

Vónandi lata suðringar seg ikki taka av fótum av eini so karráðari herferð sum hesari.

Tá fullveldið krasjaði

Bill Justinussen
løgtingsmaður

Dagurin í gjár var søguligur. Ið hvussu so er fyri Útvarp Føroya og kanska aðrar fjølmiðlar við. Hetta var dagurin, tá øll onnur minni týðandi mál sum eitt nú amerikanska forsetavalið og heimliga politiska støðan annars gjørdust sum sinnopskorn í mun til altumfatandi politiska stórmálið: at ein løgtingsmaður - fyrrverandi sýslumaður enntá - hevði brotið treytaleysu víkiskylduna og hevði ikki meldað tilburðin. Hetta var dagurin, tá fjølmiðlaheimurin við Útvarpi Føroya í oddinum vaknaði úr dvala og veruliga tóku á seg public service skylduna, sum so tungt hvílir á teirra herðum. Hetta var dagurin, tá ein fjølmiðlaetisk lóg gjørdist óneyðug, tí nú varð ósvitaliga prógvað, at fjølmiðlarnir til fulnar røkja sína týdningarmestu uppgávu. Nú skuldi ein løgtingsmaður, sum frammanundan annars er kendur burturi og heima fyri sína reiðligheit, avdúkast og svavast á almenna altarinum, tí nú hevði hann sambært tíðindunum í fjølmiðlunum (við vilja sjálvandi) latið vera við at melda seg sjálvan. Í samrøðu við ein ovurspentan útvarpsmann var mest náttúrligi spurningurin sjálvandi: hvørjar avleiðingar skuldi hesin stórpolitiski tilburðurin fáa fyri ikki bara løgtingsmannin sjálvan, men eisini fyri flokk hansara og kanska fyri alla fullveldisgongdina sum heild. Tað var heilt greitt at skilja millum linjurnar, at nú kundu vit føroyingar ongantíð aftur seta vónir okkara til einar frælsar Føroyar, tí ein av oddvitunum hevði brotið treytaleysu víkiskylduna. Óhappið tykist mótvegis Útvarpi Føroya at hava sáað slíkan iva um trúviði løgtingsmansins, at hann tað sama helst bara burdi tikið seg úr politikki og ongantíð víst seg aftur, tí treytaleysa víkiskyldan varð brotin. Álvarsligt, álvarsligt!!

Gott, at vit føroyingar fáa slík hágóðskutíðindi, tá vit nú vita, at vit rinda meira enn nakað annað land í heiminum fyri at hava eitt alment útvarp. Tað skuldi bara manglað, at vit ikki fingu hesi tíðindini einar 6-7 ferðir hendan søguliga dagin, tí slík álvarslig brot framd av einum løgtingsmanni, sum als ikki er eitt vanligt menniskja, kunnu bara ikki fara stillisliga aftur við borðinum. Tað er heldur ikki á hvørjum degi, at treytaleysa víkiskyldan verður brotin, má metast. Tíðindavirðið í hesi hending má metast at vera ómetaligt, og vónandi er bæði tingflokkur løgtingsmansins eins og alt Føroya fólk ílætið til at taka øðiligu politisku avleiðingarnar av hesum ferðsluóhappi.

Álvaratos, okkurt meiri kveikjandi kundu fjølmiðlarnir nýtt sína orku til.

Allahalganadagur – minningardagur teirra sjólátnu, ella Halloween hald í Føroyum – heiðin veitsla fyri spøkilsum?

Heidi Petersen
løgtingskvinna

Altjóðagerðing.

Í eini størri og størri altjóðagerð av heiminum, har samskiftismøguleikarnir gera heimin minni og minni, og við tíðini meira og meira eins, har gerandisdagurin í veruleikanum er hin sami, um tú býrt í Tórshavn, Tokyo ella Torino, við tað at vit nýta eins bilar, eta eins mat, ganga í eins klædum, lurta eftir sama tónleiki, síggja somu sjónvarpsrásir, nýta eins hentleikar í heimunum, verða eisini mentanarmunirnir máaðir burtur.

Útlendsku mentaninar floyma inn yvir okkum sum ongantíð áður. Tað er sunt og er eisini ein avbjóðing. Tað er við at seta fokus á okkara egnu mentan og menna hana, at tað gevur okkum hugskot og íblástur til endurnýggjan. Tað forðar fyri, at vit steðga upp og gerast nalvaskoðandi, og tað, sum vit halda hava størsta týdning, noyðir okkum alla tíðina at taka støðu til okkum sjálvi sum menniskju, og hvat tað er, vit standa fyri, og hvussu vit í framtíðini fóta okkum sum fólk.

Allahalgannadagur.

Allahalgannadag halda vit sum minningardag teirra sjólátnu. Upprunin er katólskur, og er hetta dagurin, tá katólska kirkjan heldur ein heiðursdag ella ein minningardag fyri sínum halgimennum. Hetta er uttan iva eisini grundin til, at vit í Føroyum júst valdu henda dag til minnisdag teirra sjólátnu.

Halloween.

Men fyri katólsku tíðina hildu keltar í Írlandi í 5. øld fyri Krist dagin sum eitt nýggjárshald, tí keltiska árið endaði 31. oktober. Pátrúgvin var, at hesa nýggjársnátt reikaðu øll spøkilsi - ella sálir teirra deyðu - kring um í bygdunum og leitaðu sær eftir nýggjum kroppum at búsetast í. Fólk gjørdu so alt, tey kundu fyri at ræða hesar sálir, sum vóru á ferð. Hetta var gjørt við eitt nú at hava tað óskukalt í húsunum, so ongin sál varð drigin til hús. Eisini gingu fólk grýluklødd um náttina og reikaðu frá húsi til hús fyri at ræða sálirnar burtur og soleiðis forða fyri, at tær tóku bústað í teimum sjálvum. Alt í alt ein heiðin ræðunátt, sum endurspeglar ser í nútíðini sum Halloween hald.

Niðurstøða.

So mín spurningur er: Vilja vit í Føroyum varðveita allahalgannadag sum minningardag teirra sjólátnu, ella fara vit at lata útlendska áriniið troðka henda minningardag burtur og ístaðin seta eina heidna ræðsluveitslu á skránna? Hetta kann bert tíðin vísa, men mín vón er, at okkara mentunarligi samleiki og styrki megnar at standa ímóti hesum fremmanda árini á ein sovorðnan hátt, at minningardagur teirr sjólætnu, ikki verður skalaður.